Fróðskaparsetur Føroya

5. oktober 2010

**Frágreiðing til stýrisfund nr. 3/2010**

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Hósdagin 9. september 2010 kl. 12.00-17.00 og fríggjadagin 10. september kl. 9.00-14.00 |
| Fundarstað: | KT-tænastan, J.C. Svabos gøtu 7 / Hotel Føroyar, Oyggjarvegi 45 |
| Til staðar: | Herálvur Joensen, stýrisformaður, Jan Mortensen, næstformaður, Juanna Joensen, Winny í Pætursastovu, Ása Róin, Tove Bull, Johann Jansson Petersen, stýrislimir, Jóan Pauli Joensen, rektari og Rúna Hjelm, fyrisitingarstjóri. Hans Pauli Joensen, dekanur á Náttúruvísindadeildini, var til staðar undir viðgerðini av máli 7 og Hugin Skaalum, fíggjarleiðari, var til staðar undir viðgerðini av máli 10. |

**Dagsskrá:**

1. **Góðkenning av 2/2010 stýrisfundi 27. mai 2010.**
Fundarfrásøgn 2/2010 varð góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
Dagsskráin varð góðkend.

3. **Fíggjarstatus fyri 2010.** (J.nr. (3) 10-12-20070015).
Fíggjarleiðarin legði fram eina frágreiðing um fíggjarstatus fyri mánaðirnar januar-juli. Stýrið bað um, at ansað verður væl eftir gongdini á ymisku rakstrarstøðunum, soleiðis at stundir verða at tillaga raksturin, um útreiðslurnar av onkrari grund skuldu vaksið meira enn roknað verður við. Serliga varð dentur lagdur á, at leiðslan sum skjótast tekur upp samband við Granskingardepilin við atliti at staðfesta, hvørt væntaðu inntøkurnar fyri 2010 fara at halda. Gera tær ikki tað, eiga neyðug stig at verða tikin sum skjótast fyri at tillaga útreiðslurnar.

4. **Fíggjarætlanin fyri 2011.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070009).
Fyrisitingarstjórin greiddi frá, at í samskiftinum millum Mentamálaráðið og fyrisitingina er fyribils niðurstøðan, at játtanin til Setrið komandi fíggjarár verður um leið tann sama sum í 2010. Tó eru útlit fyri, at lagt verður upp fyri útreiðslum hjá Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum og Náttúruvísindadeildini.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272 FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14 FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Bygnaðar- og strategitilgongd.** (J.nr. (3) 10-00-20070013).
Stýrið umrøddi ætlanina at seta í verk nýggjan bygnað á Setrinum. Stýrið staðfesti, at hetta arbeiðið hevði tikið drúgvari tíð enn upprunaliga væntað og vónað. Stýrið ásannar, at tað eru nøkur viðurskifti, sum mugu fáast upp á pláss, áðrenn bygnaðarbroytingarnar kunnu setast í verk. Stýrið var tó samt um, at málið eigur at verða endaliga avgreitt á fundinum í november. Til ta tíð skal fyrisitingin hava kannað, hvussu ætlaði leiðslubygnaðurin kann fíggjast innan fyri játtanina hjá Setrinum.

Í sambandi við viðgerðina av hesum máli gjørdi stýrið eisini nakrar minni broytingar í strategiskjalinum og arbeiddi somuleiðis við orðingini um missión og visión fyri Setrið. Stýrið metir, at við seinastu broytingunum er strategiskjalið við orðingini um missión og visión klárt at senda deildunum til viðmerkingar. Somuleiðis bað stýrið um, at arbeiðið við at menna visuella samleika Setursins verður uppafturtikið.

Stýrið er samt um, at lýsing eftir komandi rektara skal krevja í minsta lagi sama granskingarførleika, sum lógin ásetir fyri dekanar.

6. **Nýggj starvsskipan á Setrinum.** (J.nr. (3) 10-00-20070022).
Rektarin legði fram eitt notat um nýggja starvsskipan á Setrinum. Stýrið umrøddi uppskotið, og niðurstøðan var, at rektarin skuldi tillaga og einfalda uppskotið. Hetta uppskotið skal leggjast fyri stýrið til samtyktar millum funda.

7. **Sundurgreining og dokumentatión av arbeiðstíð hjá vísindastarvsfólki og lærarum.** (J.nr. (3) 10-20-20070011).
Grundin til, at stýrið tekur hetta málið upp til viðgerðar, er, at Setrið í dag ikki hevur ein felags leist fyri skráseting av undirvísing. Dekanurin á Náttúruvísindadeildini legði fyri við at lýsa ein leist fyri umrokning av tíð fyri undirvísingartengt arbeiði. Hesin leisturin er úrslit av einari tilgongd, sum hevur verið á deildini fyrr í ár, og arbeiðið byggir eisini á ein leist frá náttúruvísindaliga fakultetinum á Københavns Universitet. Eftir hetta greiddi fyrisitingarstjórin frá undirvísingarskipanini á Læraraskúlanum og fyri tímaløntari undirvísing á Setrinum. Hesar skipanir eru partar av sáttmálanum millum Akademikarafelag Føroya (AKF) og Fíggjarmálaráðið. Skipanin á Læraraskúlanum skilir ikki ímillum ymisk fak á skúlanum, og fyrisitingarligar uppgávur verða eisini umroknaðar við støði í undirvísingarskipanini á Læraraskúlanum. Stýrið helt, at leisturin, sum dekanurin legði fram, er eitt gott útgangsstøði fyri víðari arbeiðið við at gera ein felags leist fyri undirvísingartengt arbeiði á Setrinum. Stýrið legði tó dent á, at hóast Setrið skal menna ein felags leist fyri undirvísing, er tað tó fíggjarjáttanin fyri ymisku deildirnar og skúlarnar, sum fer at avmarka møguleikarnar fyri menningini av einum leisti. Stýrið samtykti, at arbeiðið við at gera ein felags leist fyri sundurgreining og dokumentatión av undirvísingartengdum arbeiði skal setast í verk. Ein stýrisbólkur mannaður við dekanum frá øllum deildunum skal setast við rektaranum sum leiðara og fyrisitingarstjóranum sum skrivara. Bólkurin skal gera stýrinum frágreiðing um arbeiðið til fyrsta stýrisfundin í nýggja árinum.

8. **Reglugerðin fyri vali av starvsfólki og lesandi í stýrið endurskoðast.** (J.nr. (3) 10-00-20070018).
Fyrisitingarstjórin legði eina dagførda reglugerð fyri vali av starvsfólki og lesandi í stýrið fram fyri stýrið. Stýrið hevði sum viðmerking til reglugerðina, at PhD-lesandi av Mentamálaráðnum vóru sett í sama bólk sum lesandi á Setrinum. Stýrið heldur, at rættast er, at bólkurin við PhD-lesandi verður lagdur aftur at starvsfólkabólkinum, og heitir tí á Mentamálaráðið um at broyta hesa ásetingina í sambandi við val á Setrinum. Stýrið tók annars undir við broytingunum í nevndu reglugerð.

9. **Løgtingsins Umboðsmaður vil verða kunnaður um viðgerðina av málinum um, hvar markið gongur fyri uppgávunum og heimildunum hjá Fróðskaparsetrinum, stýrinum og Mentamálaráðnum – og vil vita, hvørja niðurstøðu stýrið kemur til.** (J.nr. (3) 10-03-20070038 og (3) 10-00-20070021).
Løgtingsins Umboðsmaður vísir í brævi dagfest 17. august 2010 til samrøðu, sum stýrisformaðurin hevur havt við útvarpið, har upplýst er, at stýrið á komandi stýrisfundi fer at viðgera spurningin, hvar markið gongur fyri uppgávunum og heimildunum hjá Fróðskaparsetrinum, stýrinum og Mentamálaráðnum, herundir um stýrið metir, at Mentamálaráðið kann geva Fróðskaparsetrinum boð um, hvussu nógv lesandi verða tikin upp. Eftir at hava víst til lógarásetta rætt umboðsmansins av sínum eintingum at taka mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar, biður Løgtingsins Umboðsmaður stýrið um at kunna seg um viðgerðina og hvørja niðurstøðu, stýrið er komið til í hesum máli.

26. august 2010 heitti stýrið á Jógvan Elias Winther Poulsen, advokat, um at gera stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya eitt upprit, sum við støði í seturslógini (løgtingslógin frá 2008 um Fróðskaparsetur Føroya) og annars aðrari viðkomandi lóggávu ella venju greinar markamótið millum uppgávurnar hjá Fróðskaparsetrinum /stýrinum og tær hjá Mentamálaráðnum. Av tí at málið snýr seg um boðini frá Mentamálaráðnum í summar, tá Setrið fekk boð um at bíða við at taka nýggj lesandi inn, til landsstýriskvinnan í mentamálum hevði havt høvi til at fáa neyðugu játtanina til økta eftirspurningin eftir lestrarstuðli til vegar, høvdu møguligar ásetingar um fíggjarliga raksturin serligan áhuga.

Jógvan Elias Winther Poulsen, advokatur, er millum annað komin til hesa niðurstøðu:

> *"Sambært § 16 í lógini um Fróðskaparsetur Føroya er virksemið á Setrinum fíggjað við játtan á fíggjarlógini. Einki er ásett í fíggjarlógini viðvíkjandi játtanini fyri Setrið, at játtanin til og raksturin av Fróðskaparsetri Føroya er tengt at játtanini til lestrarstuðul. Ei heldur er ásett, at Fróðskaparsetur Føroya skal hava atlit fyri játtanini til lestrarstuðul, tá Setrið og ymsu deildirnar á Setrinum taka avgerð um upptøku av lesandi.*
>
> *At játtanin til Fróðskaparsetur Føroya, ið er ein rakstrarjáttan, er hildin atskild frá játtanini til lestrarstuðul, ið er ein lógarásett skylda, stuðlar eisini undir, at talan er um játtanir, sum ikki hava beinleiðis samband við hvørja aðra.*
>
> *Undir hesum umstøðum og serliga vísandi til, at tað er beinleiðis ásett í lógini, at landsstýrismaðurin ikki kann geva Fróðskaparsetrinum tænastuboð, hvat viðvíkur virksemi, fevnt at § 2, meti eg ikki, at Mentamálaráðið hevur heimild til at geva Fróðskaparsetri Føroya tænastuboð viðvíkjandi upptøku av lesandi, herundir boð um at bíða við at taka upp lesandi vísandi til játtanir, sum eru Fróðskaparsetri Føroya óviðkomandi."*

Stýrið hevur noterað sær niðurstøðuna í uppritinum frá advokatinum og samtykti, at stýrisformaðurin skuldi senda eitt svarskriv til Løgtingsins Umboðsmann um málið við avriti til Mentamálaráðið.

Stýrið var samt um ikki at dvølja við hetta málið afturlítandi, tí
*at* Fróðskaparsetrið í summar tók upp teir umsøkjarar, sum mettir vóru skikkaðir til upptøku, og
*at* Fróðskaparsetrið í samstarvi við Mentamálaráðið fer at samskipa upptøkuna av lesandi, soleiðis at upptøkureglur og –mannagongdir frameftir eru greiðar.

Vísandi til kunningina undir máli nr. 12 fegnaðist stýrið somuleiðis um, at lýsingarátøkini, sum vórðu gjørd í vár fyri at fáa fleiri lesandi inn á Fróðskaparsetur Føroya, góvu úrslit. Ongantíð áður hava so mong søkt inn á Setrið, og ongantíð áður eru so mong tikin upp. At økja um talið á lesandi og harvið lækka eindarútreiðslurnar fyri hvønn lesandi hevur verið eitt høvuðsmál.

Stýrið ger ætlandi ikki meira við málið.

**Kunning:**

**10. Kunning um nýggj starvsfólk á Fróðskaparsetrinum.**
Rektarin kunnaði millum annað um nýggjar starvssetanir á Fróðskaparsetrinum.

**11. Kunning um ymisk viðurskifti á Granskingardeplinum.** (J.nr. (3) 10-00-20070020).
Rektarin greiddi frá um semjuna, sum var fingin í lag millum Granskingardepilin og leiðsluna á Setrinum. Millum annað er semja um:

- at tey 4 starvsfólkini á Granskingardeplinum í fyrsta umfari verða sett við somu treytum sum adjunktar, og at vísindaliga avrikið hjá hesum starvsfólkum eisini skal metast
- um Granskingardepilin ikki hevur fígging til øll starvsfólkini á deplinum, áliggur tað leiðaranum at siga onkran av hesum úr starvi
- at Granskingardepilin skal hava eitt ½ ársverk fyri at útvega undirvísing, vegleiðing og fyrireiking av skeiðum o.ø. til Søgu- og samfelagsdeildina
- at støðan hjá Granskingardeplinum í bygnaðinum hjá Setrinum er meiri avklárað

**12. Kunning um upptøku av lesandi í ár og ætlanir um at samskipa upptøkuna komandi ár.** (J.nr. (3) 10-49-20070022 og (3) 10-49-20070024).
Stýrið metir, at málið við at fáa fleiri lesandi á Setrinum partvís er rokkið. Stýrisformaðurin gjørdi vart við, at Mentamálaráðið á fundi tann 9. september 2010 hevði spurt, hví Setrið velur at bjóða út og seta á stovn eina so smala útbúgving sum jarð- og havfrøði. Stýrið metir eisini, at tørvur er á at menna tvørfakligar útbúgvingar á Setrinum eins og at seta nýggjar útbúgvingar á stovn. Stýrið var samt um, at frameftir eigur stýrið at samtykkja, hvørjar útbúgvingar verða bodnar út, og hvørjar verða settar á stovn. M.a. varð tosað um at áseta minsta tal á lesandi fyri, at ein útbúgving verður stovnsett, tó at møguleikin fyri at víkja frá hesum kanska eigur at vera til staðar, um Fróðskaparsetrið hevur serligar fortreytir fyri at fara undir ávísa útbúgving.

Eisini metir stýrið, at tørvur er á at menna ein PhD-skúla á Setrinum. Hetta kann gerast í samstarvi við Granskingarráðið, sum er áhugað í at fíggja eitt tílíkt útbúgvingartilboð til PhD-lesandi.

Fyrisitingarstjórin greiddi frá, at rektarin hevur givið boð um, at upptøkan av nýggjum lesandi komandi ár skal samskipast, og at fyrireikingararbeiðið er farið í gongd. Ein fundur hevur verið millum skrivararnar á Setrinum, har málið er viðgjørt. Ætlanin er at seta ein stýrisbólk við dekanunum og ein arbeiðsbólk við teimum skrivarunum, sum hava havt við upptøkuna at gera. Tað er fyrisitingarstjórin, sum fer at leiða hesa verkætlanina saman við einum av starvsfólkunum á Setursskrivstovuni. Stýrið tók frágreiðingina til eftirtektar, og stýrisformaðurin upplýsti, at Mentamálaráðið hevur upplýst, at umhugsað verður at gera kunngerð, ið yvirskipað ásetir upptøkukrøvini til Fróðskaparsetur Føroya.

**13. Kunning um útbúgvingar og tal á lesandi á Setrinum komandi ár.** (J.nr. (3) 10-49-20070024).
Stýrið hevur ætlanir um, at øll skeið og allar útbúgvingar á Setrinum verða tillagað til ásetingarnar í Bologna-avtaluni. Hetta er ein liður í tilgongdini at gera útbúgvingarskipanina á Setrinum smidligari og samstundis betra grundarlagið fyri størri

tvørfakligum samstarvi um skeið og útbúgvingar á Setrinum. Stýrið umrøddi eisini møguleikan hjá deildunum at taka lesandi inn á hvørjum ári. Í sambandí við hetta var orðaskifti um, hvørjar møguleikar Føroyamálsdeildin hevur fyri at gera eina líknandi útbúgvingarskipan, sum er á Søgu- og samfelagsdeildini. Henda deildin hevur umskipað útbúgvingina soleiðis, at nýggj lesandi fáa tilboð um skeið í ymiskari raðfylgju, við tað at 1. og 2. árslesandi fáa boðið somu skeið. Úrslitið av hesari nýhugsan er, at deildin nú megnar at taka nýggj lesandi inn á hvørjum ári.

Til komandi stýrisfund ynskir stýrið at fáa kunning um bygnaðin í ymisku útbúgvingunum á Setrinum. Stýrið hevur eisini ætlanir um at áseta felags lestrarbyrjan og longd á lestrarhálvári. Fyrisitingin skal leggja uppskot um hetta fyri stýrið til komandi stýrisfund.

**14. Kunning um ymisk starvsviðurskifti.**
Fyrisitingarstjórin kunnaði um ymisk starvsfólkamál.

**15. Ymiskt - m.a. áseta næsta stýrisfund**
Komandi stýrisfundur verður mánadagin 22. november frá kl. 8.30-16.00.

RH/JPJ